VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av útsynningi og fyrrapartin okkurt ælið, men seinnapartin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 15 og 20 stig.



Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 16 og 20 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul av eystri og mánadagin okkurt ælið, men týsdagin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 15 og 20 stig.

DAGSINS FØROYINGUR:

Gleðir seg til ólavsøku

Tanja Barker 36 ár úr Havn er úti og gongur tú við hundinum Kvikk, sum er 14 ár. Tanja arbeiðir í breyðsøluni í SMS, og har hevur hon arbeitt í 4 ár.

Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Hvat gleðir tú teg til fyri tíðina?
Eg gleði meg ómetaliga nógv til Ólavsøku, tí tá kenni eg meg so glaða og eydnuríka.

Hvat fert tú í á Ólavsøku?
Eg fari í føroysk klæði. Eg fekk savnað mær eitt sett burtur úr nýggjum og gomlum fyri eini 6 árum síðani. Tey eru vanliga reyð og svørt.

Hvat plagar tú at gera á Ólavsøku?
Eg plagi at ganga oman og niðan eins og flest aðrir føroyingar.

Er okkurt tiltak, sum tú plagar at fara til á hvørjum ári?
Eg plagi altíð at fara til listaframsýningarnar, sum eru í býnum, og tað dámar mær ógvuliga væl. Í ár rokni eg eisini við, at eg fari á Ólavsøkukonsert.

Hvat heldur tú vera mest hátíðarliga løtan á Ólavsøku?
Midnáttarsangurin fær meg at kenna, at allir føroyingar hoyra saman og tá hava vit ein sterkan felagsskap.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	--
Nuuk	6
Qaqortoq	6
Ammassalik	9
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	10
Lerwick	12
Aberdeen	20
London	30
Tromsø	--
Bergen	17
Oslo	--
Stokkhólm	20
Keypmannah.	25
Helsinki	17
Moskva	18
Berlin	29
Warzawa	29
Kiev	22
Bukarest	26
Paris	33
Madrid	32
Róm	28
Malorca	31
Athen	28
Malta	29
Tunis	31
Beijing	27
New Dehli	32
Bangkok	30
Jakarta	30
Sydney	12
New York	37
Miami	30
Los Angeles	25
Meksikobýur	21
Panama	30
La Paz	13
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	18

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1027 hPa. yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað og viknar. Eitt lágtrýst, 1010 hPa. vestan fyri Írland fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjamorgunin.



Í dag:
Lágtrýstið við Ísland fer í landnyrðing. Hátrýstið í útsynning úr Íslandi kemur hendavegin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 18/7 kl. 06^{00}– 19/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 11,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,9 mm – mált frá 18/7 kl. 06^{00}– 19/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 75,3 mm

VESTFALLSKYRRINDI

25. juli Tendring

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
20. Juli	03.19	15.45	02.19	14.45	02.34	15.00	05.19	17.45	06.19	18.45	01.34	14.00	00.34	13.00	03.34	16.00	04.34	17.00	03.04	15.30	04.19	16.45
21. Juli	04.11	16.37	03.11	15.37	03.26	15.52	06.11	18.37	07.11	19.37	02.26	14.52	01.26	13.52	04.26	16.52	05.26	17.52	03.56	16.22	05.11	17.37
22. Juli	05.04	17.32	04.04	16.32	04.19	16.47	07.04	19.32	08.04	20.32	03.19	15.47	02.19	14.47	05.19	17.47	06.19	18.47	04.49	17.17	06.04	18.32
23. Juli	05.59	18.26	04.59	17.26	05.14	17.41	07.59	20.26	08.59	21.26	04.14	16.41	03.14	15.41	06.14	18.41	07.14	19.41	05.44	18.11	06.59	19.26
24. Juli	06.53	19.20	05.53	18.20	06.08	18.35	08.53	21.20	09.53	22.20	05.08	17.35	04.08	16.35	07.08	19.35	08.08	20.35	06.38	19.05	07.53	20.20

GEVID BLÓÐ

Sosialurin

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

5 707265 100050 >